# Skrivstovan hjá SSL á Tvøroyri

JACOB VESTERGAARD



Nú tað tykist at gerast greitt fyri alt fleiri fólkum, at málið um uppsøgdu skipararnar á Smyrli ikki snúði seg um, at undirritaði legði seg út í setanina av nýggjum skiparum, men einans vildi tryggja rættartrygdina hjá uppsøgdu skiparunum, hevur framhaldandi drápsroyndin á mítt politiska lív fingið annað innihald.

M.a. Sosialurin og Oyggjatíðindi eru nú farin undir at viðgera spurningin um staðsetingina av umsitingini hjá Strandfaraskip landsins (SSL) á Tvøroyri, og hvørji motiv liggja aftanfyri ta avgerðina.

Tí skal her verða greitt frá tí málinum.

**Gongdin í málinum**

Tá eg í februar 2007 kunnaði landsstýrið um avgerðina at flyta umsitingina hjá SSL til Suðuroynna, var staðsetingin eisini umrødd.

Í frágreiðingini frá landsstýrisfundinum stendur: "Avtalað var, at landsstýrismaðurin beinanvegin skuldi kunna um, at stovnurin flytir til Tvøroyri. Hetta fyri at sleppa undan kjakinum um, hvar í Suðuroynni stovnurin skal vera".

Í fyrireikingunum av flytingini helt eg fast við tiknu avgerð og gjørda avtalu, nevniliga, at umsitingini skuldi flyta til Tvøroyri. Tey, sum duga føroyska landalæru og kenna til bygdirnar kring Trongisvágsfjørð vita, hvar Tvøroyri er.

Orsøkin til at SSL var flutt til oynna var, at Suðuroynni tørvar styrk við almennum arbeiðsplássum, sum eg meti, eiga at verða býtt meira javnt kring landið.

Orsøkinar til at valið fall á miðbýin á Tvøroyri vóru fleiri. Nakrar av teimum týdningarmiklastu vóru, at hølini, sum stovnurin skuldi húsast í, vóru egnaði og klár pr. 1. januar 2008, soleiðis at verandi og nýggj starvsfólk kundu leggja sín gerandisdag til rættis eftir tí.

Harumframt metti eg tað vera skilagott, um umsitingin fall náttúrliga inn í býarmyndina, og við sínum virksemi var við til at skapa trivnað og gagn fyri økið.

Um farið skuldi verið undir at byggja nýggjan bygning á Krambatanga, við øllum tí sum tað inniber av fyrireiking og loyvum, so hevði tað verið rættiliga ótrygt í mun til tíðarætlanina. Pakkhúsið hjá Farmaleiðum á Krambatanga er eitt gott dømi um tað.

Harumframt er Krambatangi ikki á Tvøroyri, men eitt rímiliga friðaligt stað millum gamla kirkjugarðin og Rúsuna, hinumegin fjørðin. Ein skrivstovubygningur á hesum stað hevði als ikki stuðlað undir býarmyndina og trivnaðin í miðbýnum á Tvøroyri.

Tryggasta loysnin var tí at fara inn í ein verandi bygning, sum kundi innrættast til endamálið.

Fleiri bjóðaðu seg fram til at hýsa SSL. Hetta vóru allir persónar, sum eg kenni meira ella minni væl, og sum hvør í sínum lagi hava verið við til at mynda tann framburð, sum hevur verið á Tvøroyri og í Suðuroynni seinastu árini.

Út frá teimum givnu umstøðunum, sum greitt er frá omanfyri, var mett um støðuna og fall valið á "Smiðjuna".

Landsverk, sum er ráðgevi hjá landinum, tá leigumál skulu gerast, metti, eftir at hava kannað bygningin, at "Smiðjan" var væl egnað til endamálið og góðtók Landsverk eftirfylgjandi leigusáttmálan, sum varð gjørdur um "Smiðjuna".

Eg meti, at hetta var eitt gott val og tað er eisini mín kensla, at suðuroyingar sum heild halda tað sama og frøðast yvir at virksemi aftur verður í húsinum.

"Smiðjan", sum nú verður innrættað í samstarvi við SSL, er eitt væl egnað og søguliga ríkt hús, sum liggur staðsett í øki saman við m.a. Toll- og Skatt, Almannastovuni, Postverkinum, Føroya Banka og Eik.

Stásiligi bygningurin, ið hevði sæð sínar bestu dagar, er nú aftur vorðin eitt prýði fyri býin.

**Løgmaður inn í málið**

Eitt, sum ongantíð hevur verið frammi í málinum um innivist til SSL til Suðuroy er, at málið frá byrjan av hevði so stóran politiskan áhuga, at sjálvt løgmaður kendi seg noyddan at fara inn í málið.

Umvegis teldupost, sum løgfrøðiligi ráðgevin hjá løgmanni sendi til SSL og Landsverk, fyri at biðja um innlit í málið, var eg kunnaður um, at løgmaður var farin undir eftirkanningararbeiði sambært § 33, stk. 3 í Stýrisskipanarlógini.

Sjálvur fekk eg ongantíð at vita beinleiðis frá løgmanni, at eftirkanningararbeiðið var sett í verk.

Seinni fekk eg umvegis løgmansstjóran og aðalstjóran í Innlendismálaráðnum, epost við eini áheitan frá løgmanni, um ikki at undirskriva sáttmála um leigumálið fyrrenn vit høvdu umrøtt málið.

Undir eftirfylgjandi samrøðu millum meg og løgmann, greiddi eg løgmanni frá gongdini í málinum og hví júst "Smiðjan" var vald til at hýsa SSL.

Eg hoyrdi ongantíð aftur frá løgmanni og veit eg tí ikki, hvat kanningararbeiðið hjá løgfrøðiliga ráðgevanum og løgmanni endaði við.

Sjálvur metti eg tað vera uppíblanding frá løgmanni í málsøkið hjá øðrum landsstýrismanni.

Tað kann hugsast, at flytingin av SSL til Suðuroyar, er veruliga orsøkin til, at løgmaður lá mær eftir politiska lívinum.

**Tað er kanska ikki so torført at skilja**

Í áravís hava suðuroyingar valt Jóannes Eidesgaard á ting, og givið honum allar møguleikar at virka fyri oynni. Enn hava suðuroyingar fingið lítla løn fyri hetta trúfesti.

Við at seta meg í starvið sum landsstýrismaður í Innlendismálum vísti Fólkaflokkurin, at tað finnast umboð, sum tora og vilja virka fyri ítøkiligum tiltøkum, sum muna í suðri og hjá útjaðaranum sum heild.

Tískil man tað órógva løgmann, at suðuroyingar nú hava fingið eyguni upp fyri, at tað als ikki eru politikkarar norðanfjørðs, ið forða at Suðuroyggin verður ment, men at tað í nógv størri mun er ein spurningur um, at suðuroyingar higartil hava valt skeiv umboð.

# Jan Christiansen sær trøll á ljósum degi

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri



Sum fyrrverandi borgarstjóri eigur Jan Christiansen at vita, at tað, sum verandi býráðssamgonga í Tórshavnar kommunu nú ger, er í ávísan mun slíkt, sum átti at verið gjørt, meðan Jan Christiansen og hansara fólk høvdu meiriluta í Tórshavnar kommunu.

Í lesarabrævi í bløðunum mándagin boðar Jan Christiansen frá fíggjarligari skriðu í Tórshavnar kommunu.

Nei, tað verður einki fíggjarligt skriðulop í Tórshavnar kommunu. Skriður loypa, har lendið er bert og útpínt. Ikki har, sum dyrkað er.

Verandi býráðsmeiriluti hevur dyrkað fíggarliga lendið í Tórshavnar kommunu so væl, at eingin orsøk er longur til at óttast avleiðingarnar frá rakárunum undir Jan Christiansen.

Jan Christiansen roynir at geva fólki ta fatan, at verandi býráðsmeiriluti í Tórshavnar kommunu rekur ein óansvarligan fíggjarpolitikk. At prógva hetta ger hann eina roynd at seta upp, hvussu øgiliga nógv útreiðslurnar á kommunalu fíggjarætlanini eru øktar, síðan hansara samgonga legði frá sær.

Tað er rætt, at útreiðslurnar eru øktar. Og grundin er, at verandi samgonga noyðist at taka upp eftir undanfarnu samgongu og gera ein stóran part av tí, ið ligið hevur á láni, tí Jan Christiansen heldur tað síggja betri út at hava ein roknskap við lágum útreiðslum á pappírinum, enn at hava eina vælvirkandi kommunu, har borgarin fær tær tænastur, hann hevur goldið fyri.

Stórur partur av íløgunum á komandi fíggjarætlan verða gjørdar í samferðsluna og ikki minst í skúlar. Ein annar stórur partur er viðlíkahald av bygningum.

Við at lata vera við at halda kommunalar ognir viðlíka, ber til at spara pening á pappírinum eitt stutt tíðarskeið. Men úrslitið verður sjálvsagt, at tey, sum aftan á koma, noyðast at taka skrædlið og brúka lutfalsliga meira pening til viðlíkahald, fyri at ognirnar ikki skulu fara heilt fyri einki.

Tað er júst tað, sum nú hendir. Nú noyðist Tórshavnar kommuna at brúka pening upp á slíkt, sum Jan Christiansen og hansara samgonga ikki tók hond um.

Annað dømi eru stóru skúlabyggingarnar, sum Tórshavnar kommuna er noydd at gera. Vit hava ásannað, at eitt land, sum ikki hevur væl útbúgvið fólk, fylgir ikki við altjóða samfelagnum. Vit eru tí noydd at brúka nógvan pening upp á skúlabygging. Hevði Jan Christiansen havt so mikið av visiónum, at hann var farin undir hetta neyðuga arbeiði í síni tíð, var útreiðsluvøksturin á pappírinum ikki so ógvusligur. Eisini her eru stóru tølini ein ásannan av, at tað, sum Jan Christiansen hevur latið ligið á láni, hevur sitandi samgonga rygg til at fremja í verki.

Men Jan Christiansen og øll onnur kunnu vera heilt trygg. Tí alt hetta, sum Tórshavnar kommuna nú ger, hevur kommunan ráð at gera. Og hóast barnafrádrátturin samstundis hækkar, og ávís borgaragjøld lækka, hækkar skattaprosentið ikki. Tað sum borgarin fer at merkja er, at nú verða tey tiltrongdu arbeiðini gjørd og tænastur fyri allar borgarar hækka.

# Jørðin er fløt

FRÍÐGERÐ HEINESEN
borgarstjóri



….segði meirilutin – tey vistu ikki betur. Nei, jørðin er rund, sigur meirilutin nú. Hvat er hetta fyri nakað, eru vit menniskju nakrir óálítandi vingliskøltar? Ella vita vit bara betur?

Meirilutin ræður. Tað er ein partur av okkara fólkaræði og tað eiga vit at virða. Við tí fylgir ábyrgd. Tí er týdningarmikið at eisini meirilutin setur seg væl inn í øll mál og ikki letur eygu og oyru aftur fyri øllum góðum ráðum og tilmælum við tí einastu grundgeving, at tey fylgja meirlutanum – einum meiriluta, sum ikki er til longur. Jørðin er ikki fløt – jørðin er rund.

Ein meiriluti í Leirvíkar Bygdarráð mælti løgtinginum til at gera ein veg gjøgnum bygdina, eftir at samgongan hevði skúgvað eina áheitan frá einum samdum bygdarráð til viks um at gera tunnil. Avgerðin hjá meirilutanum í bygdarráðnum um veg niðri í bygdini var treytað av, at nógvar tillagingar vóru gjørdar í ætlanini – m.a. íbinding sunnan fyri bygdina. Men eisini hendan áheitan var skúgvað til viks av myndugleikunum.

Leirvíkar Bygdarráð hevur alla tíðina arbeitt fyri at fáa málið um vegaføringinia avgreitt og hevur hesi árini víst á fleiri møguleikar at loysa málið. At politikarar nú venda tí til, at bygdarráðið er vinglut og ikki veit, hvat tað meinar, er at avskepla veruleikan. Heldur eru uppskotini prógv um okkara vilja til at fáa ein loysn á málinum. Men higartil hava vit rent høvdið í móti múrinum og málið er framvegis óloyst. Hvat var so til ráða at taka?

Leirvíkar kommuna bað tí um hjálp frá ráðgevarum innan býarskipan og ferðslutrygd, sum gjørdu eitt uppskot um at leggja vegin oman fyri bygdina – uppi á Brekkum. Hendan loysnin hevur ongantíð verið viðgjørd áður, og einki veruligt tilfar hevur verið av hesi loysn fyrr enn nú. Samstundis hevur kommunan tryggjað sær, at Landsverk góðtekur uppskotið. Vegurin uppi á Brekkum liggur oman fyri byggilendið í bygdini og er í samsvar við galdandi býarskipan kommununar frá 1988. Kostnaðurin fyri vegin uppi á Brekkum er mettur at verða tann sami, sum at gera vegin gjøgnum bygdina.

Vegurin uppi á Brekkum verður lagdur uttan um bygdina og tunga ferðslan og bleyta ferðslan verða skildar sundur. Harafturat kunnu fólk ferðast yvir um vegin við m.a. undirføringum. Hetta er ein trygg loysn og í samsvar við nýggju ferðslutrygdarætlanina hjá landinum.

Eg fari við hesum at heita inniliga á løgtingslimir um at virða Leirvíkar Bygdarráð og fylgja áheitanini frá meirilutanum í bygdarráðnum um at samtykkja at gera vegin uppi á Brekkum. Við tí vísa tit virðing fyri meirilutanum og fyri fólkaræðinum.